## SAMBAND

**Heilsuhúsið og móttøka**
Brekkutún 1
FO-100 Tórshavn
Telefon 30 20 00

Mánadag - hósdag kl. 8.00 - 15.30
Fríggjadag kl. 8.00 - 15.00

Hava tygum átrokandi boð uttan fyri vanligu telefon-tíðina um kvøldið og í vikuskiftinum ber til at ringja hesi nummur:

**Sjúkraøktarfrøðingar**
millum kl. 15.30 - 7.00, telefon 79 31 99

**Starvsfólk (heimahjálp) í vesturbýnum**
millum kl. 15.30 - 23.00, telefon 79 31 21

**Starvsfólk (heimahjálp) í eysturbýnum**
millum kl. 15.30 - 23.00, telefon 79 31 61

Teldupostur til móttøkuna: heilsuhusid@torshavn.fo
Heimatænastan veitir ikki bráðfeingistænastu.

Meira fæst at vita um Heilsu– og umsorganartænastuna á www.torshavn.fo



JULI 2018

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Heimatænastan

**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32 · FO-110 Tórshavn
Telefon 302010 · torshavn@torshavn.fo

| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | kl. 9-16 |
| Fríggjadag | kl. 9-15 |



torshavn.fo



# Heimatænastan

**Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.**

Virkin og vakin – alt lívið merkir fyri okkum í Heimatænastuni, at vit miða ímóti, at gera tað møguligt hjá tær at búgva heima sum longst í best møguligum umstøðum, um tað er heilsuliga og samfelagsliga ráðiligt.

Í Heimatænastuni veita vit heilsu- og sjúkrarøkt til heimabúgvandi borgaran. Hjá okkum starvast sjúkraróktarfrøðingar, heilsurøktarar, heilsuhjálparar og heimahjálpir, og hava vit tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

Starvsfólk hava felags ábyrgd av at veita borgarum eina samanhangandi tænastu við dygdargóðari røkt, viðgerð, heilsufremjan, fyribyrging og rehabilitering.

## TAGNARSKYLDA

Øll starvsfólk, sum verða sett í starv í Heilsu- og umsorganartænastuni, undirskriva eitt tagnarskylduskjal, vísandi til §26 í Fyrisitingarlógini og §§ 152c-152f í Revsilógini.

Tagnarskyldan stendur við, tá tann setti fer úr starvi.

## SAMSTARV

Vit ynskja eitt gott samstarv við teg og tíni avvarðandi. Tá vit veita tænastu, er tað okkara mál at varðveita sínámillum virðiligt samskifti millum teg, starvsfólk og avvarðandi.

## TÍTT HEIM – OKKARA ARBEIÐSPLÁSS

Tá tú sum borgari í Tórshavnar Kommunu fært tænastu frá okkum, verður títt heim eisini eitt arbeiðspláss fyri okkara starvsfólk.

Vit ynskja, at starvsfólkini hava góðar arbeiðsumstøður, soleiðis at tey eru arbeiðsfør so nógv ár sum gjørligt, og tí er neyðugt, at arbeiðsumstøðurnar eru nøktandi. Tað er orsøkin til, at vit kanna heim títt við atliti til, at tænastan verður veitt undir tryggum umstøðum fyri borgara og starvsfólk.

Tí kann tað verða neyðugt at fáa til vega ymisk hjálpartól og gera broytingar í heiminum, áðrenn vit kunnu veita tænastu.

Vit vóna, at tú virðismetir hetta.

## HEIMIÐ

Fyri, at tú kanst fáa heimatænastu, skal heimið vera so mikið reint og ruddiligt, at tað er atkomuligt hjá okkara starvsfólkum at veita tænastu.

Tað er ábyrgdin hjá tær og tínum avvarðandi, at atkomuligt er uttandura. Tað merkir, at nøktandi ljós er uttandura, og at kavin er ruddaður/ at túnið er saltað um veturin, tá tørvur er á tí.

## ROYKING

Um tú roykir, seta vit krav um, at ikki verður roykt, meðan tú fært tænastu frá okkum.

## HÚSDJÓR

Hevur tú húsdjór, biðja vit teg um at taka atlit til tey starvsfólk, sum koma í heimið hjá tær. Starvsfólk kunnu hava ovurviðkvæmi ella vera bangin fyri djórum.

## LÓGARGRUNDARLAG

-Tænastan tekur støði í løgtingslóg um heimatænastu
-Arbeiðsumhvørvislógin www.arb.fo

http://www.logir.fo/Logtingslog/19-fra-07-04-2014-um-heimataenastu-eldrarokt-vm